# Partaeigaraavtala

# millum

# partaeigarar

# í

# P/F SMYRIL LINE

(Skrás. nr. P/F 544)

Millum undirritaðu

**1. Føroya Landsstýri, Tórshavn,**
**2. Framtaksgrunnur Føroya, Tórshavn,**

hereftir nevndir partar/partur, sum koma at eiga 58,87% av partapeninginum í

**P/F Smyril Line**
**FO-100 Tórshavn**

hereftir nevnt felagið, er í dag gjørd henda

# P A R T A E I G A R A A V T A L A

viðvíkjandi núverandi og møguliga komandi partapeningi okkara í felagnum.

## § 1. Inngangur og endamál

Felagið rekur ferðafólka- og farmaflutning í Norðuratlantshavi.

Verandi partapeningur felagsins (nom. 173.516.000 kr.) verður niðurskrivaður við 70,0%, og eftirfylgjandi verða ábyrgdarlán frá TF-Holding P/F og Framtaksgrunni Føroya, í alt 30 mió. kr., umløgd til partapening og nýggjur partapeningur á 40 mió. kr. verður innskotin frá Føroya Landsstýri (30 mió. kr.) og Framtaksgrunni Føroya (10 mió. kr.). Umleggingin av ábyrgdarláni til partapening og nýtekning av partapeningi verður til kurs 100.

1.2. Partarnir eiga aftaná niðurskriving av partapeningi, umlegging av ábyrgdarláni til partapening og nýtekning av partapeningi niðanfyri standandi ognarpartar í felagnum:

| | | | |
|---|---|---|---|
| **1.** | Føroya Landsstýri, Tórshavn | 30.810 tkr. | 25,24% |
| **2.** | Framtaksgrunnur Føroya, Tórshavn | 41.050 tkr. | 33,63% |
| | **Í alt** | **71.860 tkr.** | **58,87%** |

1.3. Endamálið við hesi partaeigaraavtalu er at skipa og fastleggja viðurskiftini okkara millum sum partaeigarar í felagnum.

1.4. Partarnir eru samdir um, at við atkvøðugreiðslu á aðal- og eykaaðalfundum verður atkvøðubýti hjá pørtunum sum niðanfyri víst:

| | | |
|---|---|---|
| **1.** | Føroya Landsstýri, Tórshavn | 37,53% |
| **2.** | Framtaksgrunnur Føroya, Tórshavn | 21,34% |
| | **Í alt** | **58,87%,** |

og verður hetta greitt soleiðis, at Framtaksgrunnur Føroya bindur seg til undan hvørjum aðalfundi í felagnum at geva Føroya Landsstýri fulltrú til at greiða atkvøðu vegna nom. 15 mió. kr. av partapeningi Framtaksgrunnsins.

## § 2. Leiðsla

2.1. Felagið verður stýrt av eini á aðalfundi valdari nevnd, sum skal hava 3-7 nevndarlimir.

2.2. Partarnir eru samdir um, at Føroya Landsstýri velur meirilutan av nevndini. Nevndin skipar seg sjálv.

Partarnir boða frammanundan hinum partinum frá, hvørjar nevndarlimir hvør parturin ynskir valdan í nevndina. Partarnir binda seg til á aðalfundi at atkvøða fyri teimum nevndarlimunum, ið soleiðis eru í uppskoti.

2.3. Vit binda okkum til á aðalfundi at atkvøða samsvarandi hesi avtalu, og at áleggja teimum nevndarlimum, vit hava valt, at atkvøða samsvarandi avtaluni.

## § 3. Keyp og avhending av partabrøvum

3.1. Um Framtaksgrunnurin tekur avgerð um at selja allan ella ein part av sínum partapeningi í felagnum, bindur Framtaksgrunnurin seg til at boða Føroya Landsstýri frá hesum. Føroya Landsstýri kann tá krevja, at Framtaksgrunnurin eisini bindur seg til at selja partabrøv hjá Føroya Landsstýri, í lutfallinum 1:1, fyri sama kurs sum Framtaksgrunnurin selir fyri, ella at yvirtaka partabrøvini hjá Føroya Landsstýri fyri sama kurs.

Um Føroya Landsstýri tekur avgerð um at selja allan ella ein part av sínum partapeningi í felagnum, bindur Føroya Landsstýri seg til at boða Framtaksgrunninum frá hesum. Framtaksgrunnurin kann tá krevja, at Føroya Landsstýri eisini bindur seg til at selja partabrøv hjá Framtaksgrunninum, í lutfallinum 1:1, fyri sama kurs sum Føroya Landsstýri selir fyri, ella at yvirtaka partabrøvini hjá Framtaksgrunninum fyri sama kurs.

## § 4. Gerðarættur

4.1. Einhvør ósemja okkara millum um tulking av hesi avtalu, ella um viðurskifti sum viðvíka felagnum annars, skal fyrst og fremst greiðast okkara millum við samráðingum. Kann ein ósemja ikki greiðast við samráðingum, skulu ósemjur okkara avgerast endaligt og bindandi av gerðarrætti sambært lóg nr. 181 frá 24. mei 1972 um

gerðarrætt. Hettar forðar tó ikki einum parti at gera nýtslu av fútarættinum til eksekutión ella fyribils rættarsókn v.m.

4.2. Gerðarrætturin skal hava 3 limir, harav hvør parturin velur ein lim, meðan ein limur verður valdur av Sorinskrivaranum. Limurin í gerðarættinum sum verður valdur av Sorinskrivaranum, er formaður fyri gerðarættinum. Um ósemjan er millum fleiri enn tveir partar, verður talið av gerðarættarlimum økt tilsvarandi.

4.3. Tann parturin, sum ynskir gerðarrættin settan, skal skrivliga boða hinum partinum frá, hvønn spurning hann ynskir at leggja fyri gerðarrættin, og hvørjar grundgevingarnar hann annars hevur fyri sínum krøvum. Tann parturin, sum ynskir gerðarætt settan skal somuleiðis viðleggja tey skjøl, hann ætlar at styðja seg við í kravi sínum, og hann skal samstundis boða frá, hvønn gerðarrættarlim hann hevur valt í gerðarættin.

4.4. Mótparturin skal innan 3 vikur, eftir at hann hevur móttikið fráboðan sambært grein 4.3, skrivliga boða hinum partinum frá, hvønn hann ynskir sum gerðarrættarlim, eins og hann skrivliga skal boða frá sakarkrøvum sínum og grundgevingum sínum. Um mótparturin ikki innan nevndu freist hevur tilnevnt sín gerðarættarlim, verður hesin gerðarrættarlimurin at tilnevna av Sorinskrivaranum.

4.5. Avgerðir hjá gerðarrættinum eru endaligar og bindandi fyri partarnar. Gerðarrætturin hevur heimild til í avgerð síni at gera av, hvør skal bera kostnaðin fyri gerðarrættin, herundir samsýning til gerðarrættarlimir. Viðgerð gerðarættsins og gerðarrættar-úrskurður er fyri afturlatnum hurðum. Tvídráttir verða at gera av eftir føroyskum rætti.

**§ 5. Gildiskoma og gildistíðarskeið fyri avtalu.**

5.1. Partaeigaraavtalan fær gildiskomu í somu løtu partarnir hava undirskrivað avtaluna.

5.2. Partaeigaraavtalan kann ikki uppsigast uttan í semju millum partarnar. Partarnir binda seg til í seinasta lagi 5 ár aftaná, at avtalan er komin í gildi, at samráðast um møguligar broytingar í avtaluni.

5.3. Framtaksgrunnur Føroya kann ikki avhenda partabrøv síni í felagnum uttan so at nýggi eigarin við áriti á hesa avtalu gerst partur av avtaluni og átekur sær tey rættindi og tær skyldur Framtaksgrunnurin hevur eftir avtaluni sum eigari av handlaðu partabrøvunum.

5.4. Um ognarparturin hjá Føroya Landsstýri kemur undir 15% av partapeninginum í felagnum, so fellur hendan avtalan burtur partanna millum.

**§ 6. Føroysk lóggáva og heimating.**

6.1. Henda avtala og onnur viðurskifti partanna millum í sambandi við avtaluna, eru undir føroyskari lóggávu.

6.2. Varnarting/heimating er Tórshavn, Føroyar.

## § 7. Partaeigaraavtalan

7.1. Henda partaeigaraavtala er einasta avtalan millum partarnar viðvíkjandi partaeigaraviðurskiftum í felagnum.

## § 8. Undirskriftir

8.1 Henda avtalan er undirskrivað í 2 eintøkum, og fær hvør partur sítt eintak.

______________________ tann _____________ 2008

__________________________ __________________________

Føroya Landsstýri Framtaksgrunnur Føroya